# Kjak



Jákup Petersen

## Er kips mannaføði?

Nú ført hevur verið fram, at grind ikki er mannaføði kundi ein spurt um sokallað chips er mannaføði.

Fyri nøkrum árum síðani blivu hillarnar við chips tømdar í Svøríki og fleiri øðrum londum. Orsøkin var, at svenskir granskarar høvdu víst á vanda fyri krabbameini í djórakanningum. Matvørueftirlitið sissaði málið, og chipsposarnir komu só líðandi upp á hillarnar aftur.

Chips verða gjørd úr tunnskornum eplum, sum síðani verða bakaði í heitari olju. Undir hesari framleiðslu verður evnið acrylamid framleitt og er at finna í chipsinum.

Acrylamid er eisini at finna í kaffi, keks snerktum breyði o.s.fr.

Framhaldandi kanningar hava eisini víst, at acrylamid við at lækka insulinið í menniskjum kann hava týdning fyri fólk við sukursjúku.

Tað finnst eisini eitt møguligt samband millum acrylamid og krabbamein í munninum. Ein vísindalig grein í American Journal of Clinical Nutrition í 2009 vísti samband millum acrylamid og nýra krabbamein.

Hvussu nógv acrylamid er í teimum vørunum sum verða seldar í Føroyum og fylgja vit teimum ásetingum sum skulu verja okkara borgarar.

Stórt sæð kann sigast, at allastaðni har "fast food" verður gjørt er vandi fyri ov høgum innihaldi av acrylamid og sostatt vandi fyri okkara borgarum.



Annika Olsen
*Løgtingskvinna*

## Internet sensur?

Nógv kjak hevur verið um lógaruppskotið um ítróttarvedding, sum varð lagt fyri Tingið fyrr í vár. Ein lóg, sum hevur til endamáls at tryggja pening til sjálvboðið arbeiði hjá eitt nú ISF, MBF og barna- og ungdómsarbeiði annars. Orsøkin til umrøðuna er tó ikki peningurin, ið skal fara til hesi limafeløg, men ein heimild til í kunngerð at seta forboð fyri ólógligar heimasíður fyri spøl á internetinum. Lat tað vera heilt greitt, at eg haldi ikki, at sensurur er ein gongd leið at fara. Vit liva í einum vesturlendskum landi við langari siðvenju við talu og skrivifrælsi, og skulu vit sjálvsagt liva upp til hetta aðalmálið. Sømuleiðis liva vit í einum landi, har rættartrygdin eigur at vera í hásæti. Kalla tað sensur ella ei, so kann tað treyðugt so vera skilagott í heilt serligum førum at seta filtur á ávísar álógligar/kriminellar heimasíður til tess at verja brúkaran. Dømi um hetta kann, sum í hesum føri, vera ólóglig spøl ella í øðrum føri heimasíður, ið hýsa barnaporno. Fert tú inn á eina heimasíðu í dag, ið hýsir barnaporno, ert tú kriminellur/kriminell sambært okkara revsilóg. Tað er komið fyri, at børn og vaksin av misgávum eru komin inn á slíkar síður og hetta beinleiðis ólógligt og revsivert.

Viðvíkjandi spølum á internetinum eru tað mong, ið eru komin í stórar trupulleikar og mist heilt nógvar pengar (ikki tí, tað ger man sum oftast, tá man spælir), men orsaka av, at spælt hevur verið á heimasíðum, har ongin trygd er fyri, at pengarnir fara til tað endamál, peningurin sigst at fara til. Tað finnast tíverri spøl á netinum, har hvítvasking fer fram, ella har peningur fer til kriminellar bakmenn, uttan at brúkarin veit hetta, og at brúkarin hevur spælt fyri nógvar pengar uttan at hava havt ein veruligan møguleika fyri vinningi. Sum sagt legði lógin um ítróttarvedding upp til eina heimild til landsstýrismannin í innlendismálum at gera eina kunngerð til tess at kunna seta forboð fyri at spæla á ólógligum heimasíðum, og tað var fyrst og fremst í hesum andanum, at lógarheimildin skuldi skiljast og ikki bert at tryggja ítróttarvedding pening. Greitt er, at áðrenn ein tílík kunngerð yvirhøvur kundi setast í gildi, eru tað nógv viðurskifti av tekniskum slag, ið skuldu greinast, og tískil varð tað neyvan ein kunngerð, ið fór at verða sett í gildi í nærmastu framtíð. Talan kundi t.d. verið í staðin fyri heilt forboð, at ein ávaring kom fram á heimasíðuna um, at man sum brúkari eigur at ansa sær at brúka pening á hesari síðu. Men um tað kann sissa borgarar, sum nú eru bangnir fyri at hava mist teirra spælifrælsi á netinum, er at siga, at hendan lógarheimildin varð tikin úr uppskotinum, eftir at lógin hevði verið í rættarnevndini, og er nú lógin endaliga samtykt í løgtinginum. Tað verða sostatt ongi forboð, filtur ella ávaringar sett á spøl á internetinum yvirhøvur. Tað hevði tó verið ynskiligt, at verturin í útvarpssendingini "Álvaratos" ikki sensureraði hesi viðurskifti, men greiddi Føroya fólki frá hesum í sending sínari fríggjadagin.



Jørgen Niclasen

## Enn eitt gjald á vinnuna

Rumbul og skrumbl eyðkendu tingfundirnar fríggjadagin og út á leygarnáttina. Fundirnir vardu úti við 19 tímar, har møði og øði eyðkendu heldur tilvildarligu atkvøðugreiðslurnar. Øll uppskot, sum kostaðu pengar vóru samtykt. Landskassin fekk øktar útreiðslur fyri fleiri 10-tals milliónir. Eisini vinnan fekk gjald álagt við avgerandi atkvøðum frá liberala Sambandsflokkinum.

Við avgerðandi atkvøðum frá Sambandsflokkinum samtyktið løgtingið at áleggja arbeiðsgevarum at gjalda dagpening til foreldur at verða heima barnsins fyrsta sjúkradag. Broytingaruppskotið, um at tað almenna skal rinda, fekk ikki undirtøku. Annar trupuleiki er at ikki øll tímalønt eru fevnd av lógini, td. limir í S og K eru ikki fevnd av lógini.

Á løgtingið hevur verið breið undirtøka fyri, at tímalønt fáa dagpening fyri at verða heima hjá sjúkum barnið. Henda rætt, sum øll alment sett starvsfólk hava havt leingi. Ósemjan hevur heldur verið, hvør skal gjalda. Frá fleiri síðum er víst á, at hetta er ein spurningurin fyri arbeiðsmarknaðin og vil løgtingið tí bróta inn í sáttmálar við at løggeva. Um løgtingið hóast hetta ynskir at løggeva, eigur løgtingið sjálvt at rinda. Ella, sum Kári á Rógvi segði undir orðaskiftinum "ynskjur ein at verða jólamaður, má ein sjálvur rinda".

Hóast hetta, vildi Miðflokkurin, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi áleggja vinnuni hetta gjald. Í álitinum vóru Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Torbjørn Jacobsen úr Tjóðveldi ímóti. Við 2. viðgerð var tó atkvøtt ørvísi. Edva Jacobsen úr Sambandsflokkinum undirskrivaði álit, har hon var ímóti, men atkvøddu fyri uppskotinum. Atkvøður úr Sambandsflokkinum tryggjaði meirluta við 2. viðgerð.

Til 3. viðgerð var broytingaruppskot lagt fram. Torbjørn Jacobsen, Kári á Rógvi, Marjus Dam, Poul Michelsen og sjálvur skutu upp at landskassin skuldi rinda. Tann sum vil geva, má eisini gjalda.

Undir orðaskiftinum vóru tingfólk sum hildu, at landskassin hevði ikki ráð. Áhugavert at hesi somu ikki eingong settu spurningin, um vinnulívið hevði ráð.

Eisini Johan Dahl, landsstýrismaður legði rættuliga upp í leikin. Við rættiliga borgarligum vendinum, hartaði hann vinstraflokkarnar fyri at ætla at leggja gjøld á vinnuna. Hetta fekk Torbjørn Jacobsen at atkvøða ímóti sínum egna broytingaruppskotið og viðmerkti hann, at nú mátti Sambandsflokkurin vísa, hvat ryggur var í teimum. Har vóru nú 15 atkvøður fyri og 15 atkvøður ímóti og broytingaruppskotið fall.

Nú kom til atkvøðugreiðslu upprunauppskotið, nevniliga at áleggja vinnuni gjaldið. Nú vóru atkvøður í Sambandsflokkinum avgerandi og málið var samtykt. Jóhan Dahl leyp úr stólinum at skelda sín egna flokk.

Øði og møði eykendi tingfundin og vinnan gjørdist taparin.

Blívi meira og meira sannførdur um at neyðugt er við nývalið, so luftin kann reinsast og ábyrgd koma aftur í politikkin.